planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

# Pipar&Salt
## høvuðsnavnið við Múrin



Í summar fáa føroyingar enn einaferð høvið at uppliva teir forkunnugu skemtararnir Sjúrður Skaale og Jákup Veyhe í víðagitnu skemtirøðini Pipar&Salt.
-Vit vita, at menninir handan Pipar&Salt hava havt eina ørgrynnu av løgum, ið nærmast eru blivin fólkaogn, og tí vilja vit geva føroyingum høvið at uppliva teir enn einaferð, sigur James Olsen, fyrireikari av festivalinum við Múrin.

Øll kenna vit Pipar&Salt, og øll hava vit eina serstaka kenslu til teir ymsu persónarnar, ið myndaðu skemtirøðina Pipar&Salt, tá ið hon var í hásæti í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum fyri nøkrum árum síðani.

Hóast nakrar skemtirøðir hava verið frammi síðani, er tað neyvan nøkur teirra, ið megnar at liva upp til tað fólkatekkið, ið Sjúrður og Jákup høvdu á sinni. Og munnu tað ikki verða nógvir føroyingar, ið gleða seg til at síggja Kára Kul, Esmar Eysturoy og Skótan í Bø á palli aftur?

-Vit kenna Pipar&Salt sum eina skemtiligan leik, við góðum tónleiki aftur við.

Í summar verður tað tann góði tónleikurin, ið setur sín dám á festivalinum, og sjálvsagt verður hetta eisini við eitt sindur av skemtiligum leiki afturvið, sigur James Olsen, fyrireikari av festivalinum við Múrin.'
Framførslan við Múrin borgar kortini fyri einum broyttum Pipar&Salt liði, tí á pallin í Kirkjubø trínur tann størsta tónleikaliga manning, ið Sjúrður Skaale og Jákup Veyhe nakrantíð hava havt við sær. Tónleikarar verða Kim Hansen, James Olsen, Jóhannes á Rógvi, Finnur Hansen og Jens Marni Hansen.

# »Tokyó«
## á top listunum



**Nýggjasta fløgan hjá Peturi Pólson »Tokyó« hevur fingið so mikið góða undirtøku frá føroyingum, at hon liggur í millum mest seldu fløgur í Føroyum í løtuni.**

**Við nýggju fløguni »Tokyó» hevur Petur Pólson megnað at vunnið sær stóran tokka millum føroyingar. Hóast Petur er ein kendur tónleikari frammanundan, so hevur hann kortini ikki fingið so stóra undirtøku frá fjøldini áður.**
**- Eg havi gjørt nakað grundleggjandi øðrvísi við »Tokyó«, nevniliga popptónleik, sum øll kunnu lurta eftir, sigur Petur Pólson.**

**Síðani fløgan koma á gøtuna, fyri einum góðum mánaði síðani, hevur hon selt ómetaliga væl, og liggur hon ímillum mest seldu fløgur í Føroyum í løtuni.**
**- Eg visti av, at fløgan var góð, men eg hevði tó ikki væntað, at hon fór at selja so mikið væl, sigur Petur Pólson.**

**Petur Pólson hevur verið nógv umbiðin síðani nýggja fløgan sá dagsins ljós, og í summar verður ikki øðrvísi. Hann skal nevniliga framføra á Vestanstevnu, á G! Festivalinum og á Asfalt.**

# Faroe5
## á Jóansøkufestivalin

**Nú er greitt, at eisini Faroe5 fara á pall á Jóansøkufestivalinum um nakrar dagar**

Áhugaverda skráin hevur fingið enn eitt navn, og tað er gentubólkurin Faroe5, ið er komin afturat á plakatini hjá Jóansøkufestivalinum.
Faroe5 varð kosin besti nýggi bólkur á Planet Awards 2008. Faroe5 gav fløgu út 5. desember í fjør. Tríggir av sangunum hava higartil ligið nummar eitt á 15 Teimum Bestu í Kringvarpinum. Teir eru Bara 1 Spæl, Tell Me Now og Eina Langa Nátt.
Faroe5 er avgjørt ein bólkur, sum føroyski ungdómurin hevur tikið til sín, og um nakrar dagar eru tær í Faroe5 á palli á Jóansøku.
Í Faroe5 eru Asta Højgaard, Jónva Ellingsgaard, Ragnhild Dam, Vígdis Fjallstein og Lillian Dalsgaard.
Fyrireikingarnar til Jóansøkufestivalin eru í hæddini, og til ber at vitja www.joansokufestivalurin.fo

